# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Russland má fult og treytaleyst virða georgiska sjálvræðið og taka alt sítt herfólk úr landinum*

*Nicolas Sarkozy*

# Gustav viknaði



*Gustav gjørdi ikki so stóran skaða sum væntað*
*Mynd: Polfoto*

**Ódnin Gustav gjørdist ikki so ring, sum veðurmenninir høvdu boðað frá. Men tann næsta er á veg**

Hóast Gustav ikki gjørdi so stóran skaða, sum myndugleikarnir stúrdu fyri, so mæla teir framvegis teimum flýddu frá at venda heimaftur enn. Eitt nú hava umleið 800.000 fólk ongan streym, og harafturat er vandin fyri varnflóð ikki av enn. Tá ódnin Katrina herjaði somu leiðir fyri trimum árum síðani, fóru byrgingarnar ikki fyrr enn dagin eftir sjálva ódnina. Myndugleikarnir í statinum Louisiana søgdu í morgun, at tá stóð ógvuliga nógv á byrgingunum sunnan fyri New Orleans, og at tað bar ikki til at siga, um tær fóru at halda.

Tá Katrina herjaði, doyðu 1.600 fólk, men hesaferð høvdu myndugleikarnir fyrireikað seg betur, og næstan tvær milliónir fólk vóru rýmd undan ódnini. Í morgun segði sjónvarpið CNN, at Gustav hevur kravt minst sjey mannalív, síðani ódnin kom inn yvir land í USA, men myndugleikarnir siga, at talið verður helst størri seinni, tá bjargingarliðini fara at leita.

Gustav var ein tropisk ódn í flokki 2, tá hon kom inn yvir strondina í Louisiana, men í morgun var hon viknað og skrásett sum ein ódn í flokki 1. Veðurmenninir siga, at hon fer at vikna uppaftur meiri, men at hon kortini fer at hava illveður við sær, tá hon seinni fer inn yvir Texas.

Samstundis hava veðurmenninir ávarað um, at ein tropiskur stormur er í ferð við at taka seg upp yvir Atlantshavinum, og at hann kann menna seg til eina tropiska ódn. Enn ber ikki til at siga við vissu, hvørja leið hon fer at taka, men fyribilsmetingar vísa, at hon fer at leggja leiðina inn í Karibiska Havið, sum vanligt er.

**Tær ringastu ódnirnar í USA 1900-2005**

**1.** Galveston, Texas í 1900. Millum 8.000 og 12.000 doyðu
**2.** Lake Okeechobee, Florida í 1928. Millum 2.500 og 3.000 doyðu
**3.** New Orleans, Louisiana í 2005. 1.600 doyðu
**4.** Florida Keys, Florida í 1935. 408 doyðu
**5.** Audrey, Louisiana í 1957. 390 doyðu
**6.** Miami, Pensacola í 1926. 372 doyðu
**7.** Grand Isle, Louisiana í 1909. 350 doyðu
**8.** Florida Keys, Texas í 1919. 287 doyðu
**9.** New Orleans í 1915 . 275 doyðu
**10.** Texas í 1915. 275 doyðu.

# ES trýstir Russland til afturtøku úr Georgia

**ES-londini eru samd um at útseta samráðingarnar við russar um eina nýggja samstarvsavtalu, um russar ikki fullføra ta hernaðarligu afturtøkuna úr Georgia**

ES-toppfundurin um Georgia-kreppuna endaði sum væntað við einari neyðsemju, sum tó gjørdist eitt sindur meiri hvassorðað mótvegis Russlandi enn tað uppskotið, sum formanslandið Frakland legði fyri ríkis- og stjórnarleiðararnar.



*Nicolas Sarkozy skal til Moskva at tosa við russar um Georgia-kreppuna*
*Mynd: Polfoto*

Í neyðsemjuni verður sagt, at tær avtalaðu samráðingarnar tann 15. og 16. septembur við Russland um eina nýggja samstarvsavtalu verða útsettar, um Russland ikki hevur tikið seg aftur í Georgia sambært vápnahvíldaravtaluni. Sambært henni skulu tær russisku deildirnar takast aftur til tær støðirnar, sum tær høvdu undan krígnum í Georgia.

Endamálið við fráboðanini hjá ES-londunum er at herða trýstið á Russland fyri at fáa landið at gera eftir vápnahvíldaravtaluni. ES vísir eisini á, at tað er vantandi virðing fyri georgiska markinum, at Russland hevur viðurkent Suðurossetia og Abkhasia. Sagt verður, at hendan viðurkenningin kann ikki góðtakast, og ES ræður øðrum londum frá at gera sum Russland.

Nøkur av ES-londunum høvdu hug at leggja eina munandi harðari kós mótvegis Russlandi. Eitt nú segði bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, undan fundinum í Bruxelles, at ES átti at steðga øllum samskifti við Russland. Hinvegin høvdu Frakland og Týskland hug at royna eina meiri lagaliga leið, og úrslitið gjørdist tí ein neyðsemja.

Mánadagin fara franski forsetin, Nicolas Sarkozy, og formaðurin í ES-nevndini, José Manuel Baroso, til Moskva at tosa við Dmitrij Medvedev, forseta um Georgia-málið. Sambært eygleiðarum í Bruxelles verður úrslitið av tí fundinum avgerandi fyri, um tær ætlaðu samstarvssamráðingarnar verða útsettar ella ikki.

## STUTT SAGT

### Flogskiparar fáa sekkin

Skandinaviska flogfelagið hevur gjørt semju við felagið hjá flogskiparunum um, at 50 flogskiparar, sum eru komnir upp í árini, verða sagdir úr starvi síðst í hesum mánaðinum. Uppsagnirnar eru ein beinleiðis avleiðing av, at SAS herfyri gjørdi av at taka 18 av sínum flogførum úr rutu í vetrarhálvárinum.

SAS ásannar, at tað er ikki vanligt at siga flogskiparum úr starvi eftir aldri, men kortini eru felagið og flogskiparafelagið komin ásamt um, at 50 verða sagdir upp nú og 40 afturat næsta ár.

Tað er alment kent, at ósemja hevur verið millum teir ungru og teir eldru flogskipararnar hjá SAS. Millum annað hava teir yngru lagt teir eldru undir at halda teimum yngru burturi, og summir fjølmiðlar tulka tær samtyktu uppsagnirnar sum eitt tekin um, at teir yngru hava vunnið stríðið.



*Nógvir eldri flogskiparar hjá SAS fáa sekkin*
*Mynd: Polfoto*

### Ljóðmøður í verkfall

Eftir úrslitaleysar samráðingar við tað almenna hava ljósmøðurnar í Íslandi gjørt av at fara í verkfall á midnátt í annaðkvøld.

Hetta verður eitt av teimum stuttu verkføllunum. Ljósmøðurnar hava gjørt av at leggja arbeiðið niður í tvey samdøgur, men tær hava samstundis gjørt greitt, at fáa tær ikki ein nøktandi sáttmála innan 29. septembur, verður veruligt verkfall.

Sum skilst eru ljósmøðurnar og tann almenni arbeiðsgevarin serliga ósamd um lønina, og kravið hjá ljósmøðrunum er, at tær skulu fáa somu løn sum tilsvarandi starvsfólk hjá tí almenna fáa, skrivar Morgunblaðið.



*Guðlaug Einarsdóttir er forkvinna í íslendska ljósmøðrafelagnum*
*Mynd: Vísir*